gult cyan magenta svart



# Fyrstu stigini

*Uppflytararnir úr Vágoynni fingu fyrstu stigini, tá Tjaldur vitjaði fríggjadagin*

Jákup Mørk

**Sóljan-Tjaldur**
**22-17 (11-6)**

Kanska hava hondbóltsáskoðarar í landinum enn ikki lært at siga navnið, Dzikgyte, men tá veturin er farin at halla, munnu tey flestu tó helst hava sæð, hvat navnið merkir. Um ikki annað, so kunnu tey bíta merki í heldur vinarligari fornavnið, Simona.

**Stórskjútti**
Tað tykist nevnliga sum um, at Sóljan við litaviska leikaranum hevur fingið hendur á einum røttum stórskjútta.

Í trimum teimum fyrstu dystunum í bestu deildini, hava vágagellurnar skotið 70 mál, og av hesum hevur Simona átt ikki færri enn 42.

Fríggjadagin var tað eisini fyrst og fremst hon, sum var upphavið til fyrstu stigini hjá Sóljuni hetta kappingarárið, tá hon skeyt 14 av teimum 22 málunum, sum heimaliðið fekk.



*Frøin hjá teimum á heimaliðnum var stór, tá tað var greitt, at tær høvdu tryggjað sær fyrstu stigini í bestu deildini* Mynd: Edvard Joensen

Av Giljanesi frættist annars, at tað yvirhøvur var Tjaldur, sum hevði betra spælið, og við at hyggja at málskjúttaralistanum tykist tað eisini, sum um liðavrikið hjá Tjaldrinum hjá var betri. Har hevði toppskjúttin fýra mál, meðan 6 aðrar býttust um hini 13. Hjá heimaliðinum vóru bert átta mál eftir, tá stórskjúttin hevði tikið sítt.

**Eisini aðrar**
Nú skal omanfyristandandi tó heldur ikki skiljast soleiðis, at Sóljan bert er ein spælari.

Liðið telur eisini aðrar leikarar, men tað tykist tó, sum um tær eru ov afturhaldnar, til tess at royna nakað sjálvar.

Úrslitni hjá liðnum hava tó verið á eini góðari leið, so um tað bert er sjálvsálitið, sum er avgerandi fyri restina av liðnum, fara hinar helst eisini at koma betri við, sum árið líður.

**Tørvar styrk**
Hjá Tjaldri tykist tó at vera verri statt. Í fjør fingu teir tær einki stig alt kappingarárið, og nógv bendir eisini á, at hetta eisini verður teirra leiklutur í ár.

Hetta skal ikki skiljast sum nøkur niðurgering, men meðan flestu kappingarneytarnir tykjast styrktar í mun til í fjør, er tjaldursliðið so at siga hitt sama.

Møguleikin fyri styrki er tó sjálvsagt framvegis til staðar, og fáa runavíkingar til dømis hendur á einum leikara, sum veruliga megnar at hótta við skotum útifrá, kann væl vera, at gerast heldur drúgvari enn væntað.

**Dysturin í tølum**
**Málskjúttar:**
Sóljan: Simona Dzikgyte 14(2), Marjun Jørgensen 2, Heidi Haraldsen 2, Jóna Gudmundsen 1, Hertha Simonsen 1, Heidi Maria Akselsen 1, Elsda Egilstoft 1
Tjaldur: Sunrid Gleðisheygg 4(2), Mona Langgaard 3(2), Kristine Ellingsgaard 3, Ann-Mari Østerø 3, Beinta Joensen 2, Oddvá Fossdalsá 1, Heidi Jacobsen 1
Brotskøst: Sóljan 2, Tjaldur 5
Útvísingar: Sóljan 3

# Gullstríðið er byrjað



*Tað var við bit og slit, at tað eydnaðist Føroyameistarunum at fáa annað stigið frá VÍF* Savnsmynd

*Javnleikur gjørdist úrslitið, tá tveir av FM-kanditatunum í kvinnuhondbóltunum tørnaðu saman í Klaksvík sunnudagin, og hetta munnu tær á heimaliðnum fegnast um*

Jákup Mørk

**Stjørnan-VÍF**
**23-23 (15-12)**

Einki var at ivast í, at tað vóru tvey av sterkastu kvinnuliðunum í landinum, sum brustu saman í Klaksvík sunnudagin.

Verandi føroyameistararnir úr Stjørnuni tykjast á pappírinum ikki at vera nakað viknaðar. Kanska heldur øvugt, tí vónirnar til Vesna II, ella Vesna Radovic, munnu í øllum førum vera stórar.

VÍF, sum gjørdi onkran vørr í fjør, og sum millum annað var einasta lið, sum vann í Stjørnuni í Klaksvík, hevur eisini spílað seg rættiliga út undan árinum. Afturat Ioana Rápa, sum nú á triðja ári spælir við besta kvinnuliðnum, hevur felagið í eisini fingið málverjan, Manuela Stan, og útileikaran, Nikoletta Rodu. Eisini hevur liðið fingið tilgongd av frægum føroyskum leikarum, so alt í alt tykjast tær sterkari í ár, hóast missin av Jacklin Djurhuus.

**Togaðu og mistu**
At byrja við var eisini líkt til, at talan skuldi gerast um ein javnan dyst í KÍ-høllini.

Eftir at gestirnir høvdu lagt seg á odda fyrstu løtuna, táttaði Stjørnan í aftur, og fram til einir 10 minuttir vóru eftir av hálvleikinum fylgdust liðini sera væl.

Seinastu løtuna tóktist tað tó, sum um orkan var um at ganga undan hjá gestunum. Takkað verið Rannvá Andreasen í Stjørnu málinum, kundi heimaliðið seta fleiri mótálop í lag, og moyru vestmannagenturnar fingu ikki gjørt tað stóra, til tess at forða, at heimaliðið kundi fara til hálvleiks við eina trý mála leiðslu.

Hjá heimaliðinum ráddi sostatt mest um at halda fast um leiðsluna, tá farið varð út aftur eftir steðgin, men tað var tó skjótt, at gestirnir fingu snarað hesum á høvdinum.

Fyrstu 10 minuttirnar eftir steðgin vildi als einki rigga hjá heimaliðnum. Einar tvær ella tríggjar ferðir høvdu tær góðan møguleika at skora, men hvørja ferð endaði alt kortini við, at VÍF skoraði í hinum endanum.

Gestirnir komu fram um við tveimum málum, men hóast Stjørnan eftir eitt time-out fekk skil á aftur, so megnaðu tær ongantíð at toga seg fram um aftur gestirnar tað, sum eftir var av dystinum.

**Málverjin hevði avgerandi leiklut**
Sum nevnt, so tóktust VÍF genturnar at vera heldur moyrar móti endanum av fyrra hálvleiki, og hetta tóktist eisini vera lagið, nú seinni hálvleikur tók at lakka.

Serliga var tað skjóta Andriana Milodanovic, sum nú fór at gera um seg, og tað sigur eisini eitt sindur, at av teimum átta málunum, sum Stjørnan fekk í seinna hálvleiki, stóð navn hennara á seks teirra.

VÍF helt tó alla tíðina nevið framman fyri heimaliðið, og tá ein minuttur restaði, fingu tær aftur lagt seg á odda.

Stjørnan fekk heldur ikki mál næsta álopið, og tí matchbólturin at kalla spældur yvir til gestirnar seinastu løtuna. Hetta vildi Rannvá í málinum tó ikki hava sitandi á sær.

Meðan meginparturin av liðfeløgunum stóðu býttar og hugdu at, fór hon sjálv avstað í kontraálop. Komin niðan á miðjuna tveitti hon bóltin til eina leysa Andrianu, sum eisini var farin í álop, og henda kundi so skjóta seinasta málið í dystinum.

Gamaní var framvegis ein minuttur eftir at leika, men hvørgin parturin fekk tó nýtt hetta til nakað sum helst, og gjørdist javnleikur sostatt endaliga úrslitið.

**Verður helst spennandi**
Javnleikurin mundi tó heldur ikki vera av eini leið, hóast tað helst vóru gestirnir, sum iðraðu seg mest um hendan. Frá teirri løtu, at tær løgdu seg á odda, megnaði Stjørnan ongantíð at toga seg fram um aftur, men hinvegin fekk VÍF heldur ikki skrykt seg leysan.

Við verandi stigaskipan hevur hetta tó fyri fyrst við sær, at hvørki av liðunum misti nakað við javnleikinum, men hinvegin fingu tær heldur ikki skapt nakað hol niður til mótstøðuna.

Hvørt hetta fer at eydnast liðunum seinni í ár, er enn ein ósvaraður spurningurin, men í øllum førum bendir tað á tað borðið, at svarið á hendan eisini er svarið upp á FM-spurningin.

**Dysturin í tølum**
**Stjørnan-VB**
**23-23 (15-12)**
**Málskjúttar**
Stjørnan: Andriana Milodanovic 8(2), Anna K. Samson 5, Vesna Tomajek 4(3), Annika Ljósstein 3, Vesna Radovic 1, Joan M. Joensen 1, Birgir Ryan 1
VÍF: Ioana Rápa 8, Fríða Marjunardóttir 5(1), Sóleyð Mikkelsen 4, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 3, Nikoletta Radu 1, Randi Kúrberg 1, Alice Høghamar 1
Brotskøst: Stjørnan 7, VÍF 2
Útvísingar: Stjørnan 3, VÍF 3



# VÍF rennur undan

*Hóast kappingarárið nóg illa er byrjað, eru longu nú tekin í sól og mána um, at tað fer at verða ógvuliga tungt hjá hinum liðunum at taka VÍF*

Jákup Mørk

**StÍF-VÍF 22-27**

Tað kendist hjá mongum, sum um var talan um ársins fyrsta toppdyst, tá StÍF og VÍF hittust inni á Skála sunnudagin.

Undan hesum høvdu bæði liðini staðið seg avbera væl, og tosið gekk longu heitt um, at ein komandi føroyameistari skal finnast millum hesi bæði. Ikki minst var spenningur um, hvussu leikandi strandavenjarin, Costin Dumitrescu, fór at roynast, nú mótstøðan kom frá einum oddaliðið.

**Dyggur smeitur hjá StÍF**
Upp á hendan seinasta spurningin má svarið verða, at so leingi hann var á vøllinum, hevði hann alstóran týdning fyri dystin, og tíverri fyri strandingar var týdningurin heilt sjónligur, tá hann skaddur mátti av vøllinum um miðjan fyrra hálvleik.

Fram til tá hevði talan verið um ein serstakliga javnan dyst, har millum lítil og eingin munur var á liðunum. Leikandi venjarin hevði verið við í so at siga øllum teimum málum, sum StÍF hevði fingið, og tað, at vestmenningar royndu at ansa honum, gav sjálvsagt betri umstøður hjá hinum leikarunum.

Hjá VÍF var merkisvert, at Áki Olsen ikki var tøkur. Hann meiddi sær fótliðið móti Kyndli, og er enn ikki førur fyri at spæla. Sum so er tó eingin neyð á bakspælarum hjá VÍF, tí samanlagt vóru yvir fýra metrar av hesum. Sámal Joensen man vera tungur hjá flestu verjunum at byrgja upp fyri, og nýggi rumenin hjá VÍF, Negru Nánut, er uppaftur størri, so har er í øllum førum nakað at hugsa um hjá mótstøðumonnunum.

Ja, somikið langt stinga teir báðir seg upp, at Sjúrður Holm, sum annars ikki er nakar lítil maður, tóktist nærum svunnin í einki við síðuna av hesum báðum risunum.

Sum nevnt, so var talan um ein sera javnan dyst, fram til Costin Dumitrescu noyddist av vøllinum, men eftir hetta byrjaðu vestmenningar beinanvegin at dragna.

Ikki tí, munurun gjørdist ikki so øgiliga stórur fram til hálvleikin, men ein sat tó alla tíðina við varhugaðum av, at vestmenningarnir líka sum høvdu tamarhald á støðuni.

**Undirhaldandi**
Beinan vegin í seinna hálvleiki gjørdist hetta enn týðuligari, tá VÍf aftur tók seg nøkur mál frá strandingunum, og í roynd og veru var eingin ivi um stigini eftir hetta.

Tað tænir tó strandingum til rós, at teir ongan tíð fullu í fátt, men alla tíðina stríddust fyri síni søk, sum tó í seinasta enda vísti seg at vera vónleys.

Serliga vóru tað Johansen brøðurnir og so Marius Joensen, sum royndu at bróta ígjøgnum, og best lá tað fyri Mariusi, tá hann við fullari ferð royndi at sleppa sær framvið verjuleikaru.

Tað var annars stuttligt at síggja tvídystin millum Alexandur Johansen og John Zachariassen, sum dystaðust úti á veinginum.

Báðir hava teir sína avgjørdu styrki í álopspartinum, og hetta viðførdi eisini, at tað viðhvørt gjørdist heldur tunnligt í verjupartinum hjá teimum. Nógvir møguleikar spurdust burtur úr hesum, men hóast hetta, so vildi hvørgin av venjarunum geva seg, við at fremja nakra verjukenda útskifting. Alexandur var tó í fleiri førum óheppum í skotroyndum sínum, og hevði hann havt ein betri dag, kundi væl verið, at dysturin hevði gjørst meira spennandi.

**Sterkir í verjupartinum**
Sum nevnt, so hevði VÍF ein risastóran hæddarfyrimum inni á miðjuni, og hetta var eisini í stóran mun viðvirkandi til sigurin.

Serliga í verjupartinum kom hetta til sjóndar, har Artur hevði meira enn torført við at koma nóg langt upp, tá skjótast skuldi.

Í álopspartinum var fyrimunurin ikki eins týðuligur, og hann átti at verið. Sámal tykist enn ikki at hava funnið sama lagið, sum hann hevur havt tey bæði seinastu árini, og nýggi rumenin tykist ikki at hava eins stóran neyvleika, sum hann hevur styrki í høgra arminum.

Hinvegin hevur VÍF framvegis Inga Olsen, og hóast hann heldur ikki skal forsmáast fyri avrikið í verjupartinum, so koma dygdir hansara best til sín rætt í álopspartinum.

Serliga kom hetta til sjóndar, tá VÍF eina løtu vóru tveir mans í undirtali. StÍF megnaði ikki at gera sær dælt av hesum, tí tá strandingar skoraðu, tók Ingi bara málið í egnar hendur, og fót einsamallur ígjøgnum verjuna. Leikandi lætt sá tað út til at vera, men neyvan hevði tað verið lætt hjá nøkrum øðrum leikara.

Tað var annars merkisvert, hvussu lítlan fyrimun StÍF fekk burtur úr teimum støðum, tá vestmenningar vóru undirmannaðir. Verjuspælið hjá gestunum var til tíðir rættiliga kontant, uttan tó á nakran hátt at vera óreint, og í fleiri førum kostaði hetta tveir minuttir á beinkinum. Hetta gjørdist tó ongantíð avgerandi fyri dystin, tí sum nevnt høvdu gestirnir tamarhald á støðuni meginpartin av tíðini.

**Stórfavorittur**
Eftir dystin stendur við risabókstavum sligið fast, at VÍF er fremsti favorittur at vinna FM-heitið. Gaman í er enn nakað tíðliga at gera eina endaliga niðurstøðu, men hinvegin verður sera tungt at aka vestmenningarnar í ár.

Bonkurin á liðnum tykist vera ógvuliga breiður, og til dystin sunnudagin máttu teir, umframt Áka Olsen, eisini vera Johnny Joensen fyri uttan. Kortini máttu leikarar sum Harald Bjørgvin, Rógvi Nielsen og Sveinbjørn Poulsen taka til takkar við sessum á beinkinum, og hetta sigur ikki so litið um breiddina.

Serliga mundi tað kennast stuttligt hjá Sveinbirni, tá hann móti endanum av dystinum varð sendur á vøllin. Summir áskoðarar »buuh'aðu« at honum, men teir flestu klappaðu, og hann slapp so eisini at gera eitt mál móti gomlu liðfeløgunum sínum.

Niðurstøðan er tó, at sum støðan er í løtuni, er VÍF fremsti favorittur at vinna FM-heitið.

**Dysturin í tølum**
**Málskjúttar**
StÍF: Marius Joensen 7(1), Artur Johansen7(1), Costin Dumitrescu 3, Alxandur Johansen 2, Pauli Poulsen 1, Kristjan Petursson 1, Janus Trygvason 1
VÍF: John Zachariasen 8, Ingi Olsen 7(2), Sámal Joensen 4, Martin Hummeland 3(1), Negru Nánut 2, Rógvi Nielsen 1, Sjúrður Holm 1, Sveinbjørn Poulsen 1
Brotskøst: StÍF 5, VÍF 5
Útvísingar: StÍF 3, VÍF 6



*At leikandi venjarin hjá strandingum er ein sera týdningarmikil partur av liðnum, varð einamest sjónligt, tá hann noyddist skaddur av vøllinum* Mynd: Álvur Haraldsen





Ferðaætlan
29. okt. 2000 - 25. mars 2001

| Dagliga: | | Fráferð | Koma |
|---|---|---|---|
| Keypmannahavn - Føroyar | DM181 | 09.35 | 10.55 |
| Føroyar - Keypmannahavn | DM182 | 11.45 | 14.55 |

Eykatúrar um ársskiftið:
20. - 21. - 22. des. & 2. - 3. jan

| Mánadag og hósdag: | | | |
|---|---|---|---|
| Billund - Føroyar | DM285 | 12.05 | 13.00 |
| Føroyar - Billund | DM286 | 13.45 | 16.30 |

*Tó verður ikki flogið til Billund frá 27. nov. - 23. okt.
Eykatúrar um ársskiftið:
20. - 22. des & 2. - 3. jan.

Tað verður ikki flogið 24. - 25. - 31. des

FLOGFELAG FØROYA
Tel 34 00 00 & 33 27 55
E-mail: travel@ff.fo & airport@ff.fo